EG MEINI TAÐ

Find dig i Eidesgaard og find dig i hvad som helst

Niels Uni Dam skrivar

Árið er 1997, dagurin er 20. februar - hetta seina vetrarkvøldið koyrir leiðarin fyri Det Konservative Folkeparti fullur á eina beton-vegforðing. Ein lovandi politisk lívsleið endar við hesum stoyti. Væl vitandi at spælið er spilt, ringir Hans Engell sjálvur til løgregluna. Hann sigur sum er, og skrivar beinanvegin tíðindaskriv til fjølmiðlarnar um vanlukkuna og støðuna, sum hann var í, tá hon hendi. Sum drivin politikari veit hann, at fjølmiðlarnir fara at válka sær í søguni, og tí er best at vera erligur.

Á fundi í det Konservative Folkeparti dagin eftir, 21. februar, verður skriv sent til fjølmiðlarnar: Flokkurin stuðlar sínum leiðara. Á tíðindafundi stutt eftir fundin, leggur Hans Engell frá sær.

Áðrenn hetta vetrarkvøld var Hans Engell spáddur at gerast næsti statsministarin. Hesin dámligi, dugnaligi og samstundis fólkaligi politikarin, hevði breiðan stuðul í nógvum flokkum, og hann hevði spakuliga bygt flokkin uppaftur eftir Tamil gøluna sum noyddi Schlüter at leggja frá sær. Men nú var ein lovandi politisk lívsleið kvett.

Hans Engell gavst tó ikki í politikki, árini eftir hetta, vóru fleiri kvettroyndir gjørdar fyri at fáa Engell aftur í leiðarasessin í Det Konservative Folkeparti. Tað gjørdist skjótt greitt, at uppsøgnin neyvan mundi vera so sjálvboðin, sum fyrst var hildið. Nógv klandur var í flokkinum, heilt til Hans Engell í 2000 fór burturúr politikki og gjørdist blaðstjóri á Ekstra Bladet.

Eitt sindur av lagnunnar speisemi; Ekstra Bladet stendur fyri júst tí slagi av fjølmiðlasiði sum gjørdi, at Hans Engell mátti frá sum leiðari fyri Det Konservative Folkeparti, og soleiðis endaði við at gerast blaðstjóri á blaðnum. Undir Hans Engell hevur blaðið profilerað seg við slagorðinum "Find dig i Ekstra Bladet, eller find dig i hvad som helst".

Mær dámdi væl Hans Engell, men eg haldi ikki, at ein flokkur skal finna seg í, at leiðarin ella annað umboð ikki megnar at halda skil á sínari alkoholnýtslu. Hevði Hans Engell sloppið at sitið, hevði hetta sent tann boðskapin út, at flokkurin fann seg í slíkum atburði.

Nú høvdu vit eina líknandi støðu í javnaðarflokkinum nýliga.

Flestu fjølmiðlarnir funnu seg ikki í hesum, og tordu at siga frá um hendingina. Eisini sóu vit Jóannes Eidesgaard á sjónvarpskíggjanum, tó ikki fyrr enn hann varð noyddur til hetta, tí tvey bløð longu høvdu prentað søguna. Eg má viðganga, at eg gjørdist heilt rørdur av Jóannesi, hann kláraði seg væl í samrøðuni við Dag og Viku, og tað var fríkst, at ein politikari ikki royndi at snúgva sær undan. Mín virðing fyri manninum vaks.

Spurningar sum, um Jóannes veruliga angraði, at hann hevði gjørt Føroyar fyri skommum, ella um hann bara angraði, tí fjølmiðlarnir skrivaðu um hendingina, melda seg sjálvandi.

Men tann mest áhugaverdi spurningurin kom, tá javnaðarflokkurin gav formanninum álitisváttan á fundi fáar dagar eftir. Hvønn boðskap sendir javnaðarflokkurin út við at finna seg í hesum? Hvussu skal flokkurin nakrantíð kunna seta mørk fyri atburðin hjá umboðum sínum, tá hann finnur seg í hesum frá formanninum?

Aðrir flokkar hava havt líknandi gølur. Tjóðveldisflokkurin hevur taklað sínar drukkgølur líka illa, ella verri enn javnaðarflokkurin, meðan sjálvstýrisflokkurin hevur sligið hart niður á slíkt.

Persónliga haldi eg, at tað er ein stór eyðmýking av javnaðarflokkinum, ja av sjálvari javnaðarhugsjónini, at tað ikki longur eitur timburmenn, men nú eitur javnaðarmenn.

Vikuskifti

Postboks 76, 110 Tórshavn, telefon 341800, telefax 341801, teldupostur: turid@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Turið Kjølbro

Ein einkisigandi lærubók

- Glámlýsi - Lærubók um Regin í Líð eftir Kirsten Brix

UMMÆLI
Kim Simonsen
kimsimonsen@hotmail.com

Føroya Skúlabókagrunnur hevur givið út eina lærubók um søgurnar og onnur skjøl eftir Regin í Líð, ið var dulnevni fyri Rasmus Rasmussen (1871-1962). Rasmus á Háskúlanum hevði gávur á ymiskum økjum. Hann granskaði plantufrøði, var háskúlalærari, skrivari í Føroya Fiskimannafelag. Hann var greinskrivari, politikari, týðari og (ein ikki serliga góður) rithøvundur.

Regin í Líð skrivaði ta fyrstu føroysku skaldsøguna, um tað tjóðskaparliga stríðið fram til 1906 "Bábelstornið" (1909). "Glámlýsi" eftir Regin í Líð kom út seinni sum hitt fyrsta stuttsøgusavnið á føroyskum í 1912. Í hesari útgávuni eru, umframt tær triggjar stuttsøgurnar, ymisk verkevni og pedagogisk eftirmæli til lærarar og næmingar. Bókin er fyrst og fremst ætlað til undirvísing á miðnámsskúlastigi. Í bókini eru prentað verkevni til allar tekstirnar í vanliga eitt sindur keðiliga studentaskúlastíli "Greina og tulka…ber saman við".

Kirsten Brix hevur kannað søgurnar hjá Regin í Líð í bókini: »Dialog i Babelstårnet. Analyse af Regin í Líðs fiktive prosaforfatterskab«, ið er ritgerð, sum er góðkend á Fróðskaparsetri Føroya.

Hon heldur, at stuttsøgurnar hjá Regin í Líð bygdu á realismuna við sálarfrøðisligum lýsingum og stættartilvitan. Hon lesur annars hesar søgur reint tematiskt sum "Høvuðstemað er seksualiteturin". Her sakni eg eina meiri formella fagurfrøðisliga tulking, hvussu eru hesar søgur realistiskar? Hvat er ein stuttsøga (t.e. burtursæð frá, at øll vita, at stuttsøgan hevur eina sentrala hending, ið broytir alt) og hvat er ein realistisk stuttsøga? Hvat er realisma? Dugdi hesin Regin í Líð at skriva?

Hon tykist vita, at søgur sum "Rakul" eru ótrúliga vánaligar, við lýsingum sum: "Hon var ein blóma so frísk og skær (…)", men ger einki við tað. Og dømi úr "Minnisvarðin": "Ingibjørg var dóttir Sigvalds bónda (…) hon var bæði væn og tekkilig; og tað vistu øll (…)". Hetta eru triðja rangs søgur, fyltar við føroyskum stereotypum og klisjéum, ið meiri skulu tæna onkrum boðskapistiskum endamáli. Søgur, ið liva á einum uppøstum melodramatiskum støði, sum kanska eru eitt vet betri enn lættisoppur. Tað er sum um Regin í Líð er áhugaverdur tí hann var føroyingur, kendur, skrivaði á føroyskum og ikki minst um kvinnumál og kúgan. Í mun til henda høvundin er ein ofta eitt sindur happaður høvundi sum Ólavur í Beiti ein reinur Proust og Jens Pauli Heinesen bæði Hemmingway og Blixen í einum.

Bókini vantar eina frástøðu til henda høvundan. Harragud, tað eru nærum 100 ára gamlar stuttsøgur, hví ikki viðgera tær soleiðis, t.v.s. sum eitt slag av bókmentasøgu. Her vantar søguligar myndir og ein vilja at seta henda høvund undir liðina á føroyskum og útlendskum høvundum. Men fyri Brix hevur tað minni at siga, at t.d. søgan "Rakul" er eitt stórt tápuligt intrigant melodrama og er ótrúliga amatørkent skrivað. Hetta tykist ikki hava nakran týdning, hon tykist ikki hava nakran áhuga í, um hesar søgur hava nakað listarligt virði í dag, men um tær umboða eitt boðskapistiskt virði. Eg fari at ivast: er hetta ein reint antikvarisk útgáva, so hví ikki bert endurprenta verkini hjá Regin í Líð?

Sum eg upplivi hetta, umboða hesar søgurnar alt tað sum var moðið við fakinum føroyskum í studentaskúlanum, har tilfar skal lesast og kanoniserast, ikki tí tað er gott, men tí tað var føroyskt. Og hvat verri er, her er ein vilji at lesa bókmentir sum eina undirdeild av mentanini, ið er ein grov skerjing. Har luktar av drýlum, fiskagentum og kanska ein góðan dag eitt sindur av sosialari indignatión, men tað er ikki nokk. Brix skrivar, at Georg Brandes hevur staðið faddur at kravinum um at skaldskapurin skuldi lýsa veruleikan og taka samtíðarligar spurningar fram sum hjúnaband, átrúnað, kynsleiklutir o.s.fv. Hetta fekk týdning fyri t.d. Ibsen, Strindberg, J.P. Jacobsen og at Regin í Líð skrivaði seg inn í hetta rák. Eg eri ikki samdur við hesum samanberingargrundarlagi. Regin í Líð hevði ikki eina kyknu skapta í kroppinum av geniala skrivingarlagnum hjá Strindberg ella av tragisku sjónleikunum hjá Ibsen. Tað er ein orsøk til, at Regin í Líð er gloymdur (serliga stuttsøgurnar), og hon er, at hann skrivaði ólukksáliga vánaligar søgur og so hjálpir ikki at kroysta hann uppí kend samtíðarrák.

Greinarnar og skjøl eru eisini tilvildarliga úrvald. Fyrsta greinin: "At lesa og hoyra" er eitt sindur lummafilosofiskt áhugaverd og vísir Rasmus Rasmussen sum ein fólkaupplýsara og undangongumann, ið saman við Símuni av Skarði setti Føroya Fólkaháskúla á stovn. Við er eisini onkur vánalig yrking og ein løgin tíðargrein um "Færøske Fiskeres Opførsel under Island". Ikki er virði stórt í hesum í dag.

Hesir tjóðskaparglorifiseraðu persónar sum tjóðarbyggjararnir og háskúlamenninir dugdu mangan hvørki at skriva ella at hugsa áhugaverdar tankar, men vit eru ikki komin eitt vet við mentunarsøguligu uppgerðini og bardaganum um føroysku fortíðina. Enn standa teir sum standmyndir og teirra vánaligu greinar og elendigu skribaríir skulu gevast út í skreytbókum. Hevði væntað mær meiri av Føroya Skúlabókagrunni og einum høvundi av eftirskriftini, ið er doktari í hesum vánaligu søgum. Støðið á slíkum bókum, ið Dansklærerforeningen t.d. gevur út, er mangan ótrúliga høgt. Í so máta ger henda bókin ongan mun.

Glámlýsi er 147 blaðsíður og kostar 148 krónur. Permuna við mynd eftir Mikines hevur Grafik Studio gjørt, og Hestprent hevur staðið fyri prentinum.

Gud er danskari – *enn Guð*

- Alexandur Kristiansen við nýggjum savni

»og lat okkum ikki gloyma
at elska okkara dreymar
sum sakleysar spírandi dagar (…)«
Frá: Verðin. Alexandur Kristiansen 2003.

Í sekstiárunum komu yrkjarar sum Guðrið Helmsdal Nielsen, Líggjas í Bø, Steinbjørn B. Jacobsen, Alexandur Kristiansen, Heðin M. Klein og Rói Patursson fram. Her var okkurt heilt annað og nýtt. Tjóðskaparyrkingin hvarv saman við ævigu regionalistisku føroysku mytologiseringini av náttúruni, bygdini og heimstaðnum. Guðrið er ótrúliga fín og modernað í støðum. Líggjas í Bø merktur av undirgangsvisiónum. Bæði hann, Guðrið og Steinbjørn eru í støðum nýskapandi leidd av modernistiskum ráki, men Alexandur var ikki so lættur at flokka í henda bólk.

UMMÆLI
Kim Simonsen
kimsimonsen@hotmail.com

Mentunargrunnur Studentafelagsins hevur herfyri givið nýggja yrkingasavn hansara »Gud er danskari« út. Eins og yrkjarin Henrik Nordbrandt er Alexandur ein klassiskur yrkjari. Hann er hugtikin av heimslýrikki og kennir heimsins yrkingar. Nærum eingin hevur týtt so nógvar stórar yrkjarar sum Alexandur, ið eru at lesa í søvnunum "Lógvalestur", "Anadyomena" og "Veingir". Javnan hevur hann í bløðunum týddar yrkingar eftir yrkjarar sum Ovid, Johan Wolfgang von Goethe, Homer til íran Seamus Heany, og serliga hevur sonettin fingið eitt stórt pláss. Slík søvn mynda ein virknan og dugnaligan týðara, ið orkar at flyta og enduryrkja eitt dygt úrval av heimsbókmentum til føroyskt. Hann ferðast heimkunnugur ímillum øll hugsandi sløg av lýrikki sum William Carlos Williams (1883-1963, USA), Rainer Maria Rilke (1875-1926, Eysturríki) og Friedrich von Schiller (1759-1805, Týskland).

25 ár sum føroyskur yrkjari

Alexandur hevur verið frammi leingi, tí tað er ein løta síðani savnið "Nón" kom í 1968 og "Assa" árið eftir. Tað vil siga, at hetta savnið er eitt 25 ára jubileumssavn. Seinni komu t.d. : "Jomfrú við ongum bróstum", "Við fjøll og bláan fjørð", "Málið er mitt øki", "Várt dagliga lív", "Útskot", "Havnarlív", "Kærleiki mín", "Staksteinar" og "Odysseus í hjartanum". Hann hevur týtt bøkur sum: "Tann lítli prinsurin", barnabøkur og mangt annað. Er hann ikki í holt við týðingar ella barnabøkur skrivar hann sjálvur.

Í hesum savninum koma vit sveimandi omanifrá, myndin er tikin oman skýggini við heitinum: "Gud er danskari", vendir tú savninum við, so stendur »enn Guð« á bakpermuni, og greitt er, at yrkjarin heldur gleim. Tað er jú púra greitt, at Gud við d er danskari enn Guð við ð! Ein lítil tilsiping er ivaleyst til Róa Patursson, sum segði, at »at uttan ð / kann eingin liva«! Við sjálvstýris roksi og nýføroysku nationalismuni í huga tykist tittulin »Gud er danskari« sum eitt stuttligt ískoyti til hetta kjak.

Í savninum eru einar 46 yrkingar á 79 síðum. Tær eru ymiskar í longd og í góðsku. Fyrst kemur ein haikuyrking, ið hann helst hevur týtt sjálvur, ið snýr seg um minnið, ið gevir savninum dám av at vit eru í minninum og ein farra av melankoli.

Ein klassiskur yrkjari

Yrkjarin er klassiskur í búna. Allar yrkingar hava t.d. heiti og hann brúkar øll tekin. Nógvar yrkingar í savninum eru um at yrkja og um mál: "tú motir í málinum tey flestu mistrúgva". Fyrsta yrkingin "Ferðamaður" ber okkum inn í ferðina og inn í yrkingaheim: "burtur í onnur lond burtur í aðrar oyggjar/ burtur í onnur mál". Onkur yrking er eitt sindur argandi, sum yrkingin. "Hvít nationalisma": "Úti í kavanum/ stendur ein flaggstong/ og skríggjar/ eftir litum". Og: "Fyri tað um fyrsti føroyingurin/ æt Grímur Kamban // er eingin grund til/ at hvør Hanus og Janus skal/ hava Kamban til eftirnavn (…)". Hetta er eitt sindur stuttligt, men alt annað enn góðar yrkingar, tí hesin boðskapur hevur hugin at kvæla formin og hetta gerst boðskapisma, ið eisini hendir í yrkingum sum "Tey ráðandi", "Innhugsin yrkjari á útoyggj", "Fátækur kapitalistur". "Útlendingar eru inn…". Nógv betur stendur til í yrkingum sum: "Myrkingar", har ein semi-abstraktur og áhugaverdur formur spælir sær: "Elskaða - / í kvøld ert tú opin/ sum myrkrið í gomlu málningunum/ hjá Mikinesi". Eisini yrkingin "Verðin": "(…) og lat okkum ikki gloyma/ at elska okkara dreymar/ sum sakleysar spírandi dagar (…)". Onkur yrking er stutt og banal, sum "Tvær flugur", "Spegil", "Hetta er ein yrking", meðan aðrar eru langar, samansettar og góðar sum yrkingin "Livandi" og "Synd er í fuglunum": "(…) synd er føroyinginum sum altíð er danskari/ synd er í indianarunum sum verða týndir (…)". Yrkingin "Lívið skrivar tað tú sært" er ein fylt við originalum myndum við poetiskum spenningi: "At doyggja/ er sum at fara út og síggja mánan hvørva/ aftur undir eitt skýggj // og tá hann kemur undan/ fert tú inn aftur/ men verður standandi eina løtu/ sum um einki var hent // áðrenn tú ósæddur leitar tær afturundir onkunstaðni (…) har sálin syngur í takrennuni um sítt skroypiliga land".

Minnið

Alexandur Kristiansen hevur einaferð skrivað nøkur góð orð um danska yrkjaran Henrik Nordbandt og møtið við hann á Andys Bar á Gothersgade. Tá helt hann um mannin: „hetta eisini ein dyggiligur varði, hann hevur reist sær sjálvum móti endanum av 20. øld. Artur Lundkvist hevur sagt í einum ummæli, at »samstundis sum at Henrik Nordbrandt stendur mitt í nútíðini, sum í eini fossandi á, vendir hann bakið ímóti eini sera ivasamari framtíð og lítur inn í tað farandi, tað hvørvandi og tað, ið longu er horvið. Bert tað farna er fyri honum tað sanna livandi; tað, sum við sínum sakni gevur dýpd og týdning til tað, sum nú er. Men tá ið saman um kemur, rúmar hugburður hansara kanska eini fjaldari framtíð, einum vilja at líta aftureftir til tess at fara í holt við tað mista og føra tað víðari, eini endurskapanarhugsan, sum tykist at hava eitt vaksandi rák við sær. ... Henrik Nordbrandt hevur vágað tað, sum heimføðingarnir ikki í sama mun kenna til. Hansara skaldskapur er at finna í einari framtakshugaðari balansustøðu, í einum spenningsøki sum ein línudansari.«

Hetta segði høvundin sum fekk barnabókavirðislønina hjá Tórshavnar býráði. Yrkjarin frá Fuglafirði føddur í 1949. Lærarin og fyrrverandi sjómaður, ið er ein kendur orðasmiður í føroyskum skaldskapi. Hesi orð siga nógv um Alexandur sjálvan, ið eisini stendur mitt í nútíðini, men vendir eisini bakið ímóti eini ivasamari framtíð og lítur og brúkar tað farandi.

Alexandur Kristiansen er kanska nakað ójavnur sum yrkjari, men hevur av og á okkurt heilt serstakt. Kanska er tað tí hann dugir so ótrúliga væl at týða, at hann hevur eina tilvitan um gamla yrkingahevd. Her er eingin avantgardutónar sum so, eingin postmodernað ella seinmodernað smartness og einki popsmart týðarrákskent rák. Hann livir ikki í tí speisama elementinum, har kenslur skulu pettast í smáar bitar ella berjist ímóti heildum, heildarhugsjónum og tonkum um, at málið kann umboða nakað alment ella samanhangandi, so sum t.d. pathos. Hann er í Føroyum skildur við Kára P., Róa Patursson og Jóanesi Nielsen. Alexander er hin vegin ikki ein gamaldags yrkjari, hann hevur valt at halda seg eins langt frá t.d. Per Højholt sum Pól F. var frá Tóroddi Poulsen.

Yrkingasavnið »Gud er danskari — enn Guð« er 80 síður og kostar 140 kr.